# Í ørvitri av snillingum í heimsflokki



*Tað var bíliga sloppið, at russiska liðið bert vann við trimum málum á okkara monnum*

**Russarar vístu kanska besta spælið, sum nakrantíð hevur verið at sæð í Føroyum, og serliga í 1. hálvleiki høvdu teir lætt spæl, tí føroyska liðið ikki var nóg væl skipað**

LANDSDYSTUR
*orð: Jóannes Hansen*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Onkuntíð verður harmast um tap ímóti stórum tjóðum, tí tað var ikki sambært býti av spæli og møguleikum. Aðrar ferðir er staðfest, at størri og minni tap hava verið, sum tað kundi verið roknað við, og aftur aðrar ferðir hevur verið stórur fagnaður um javnleikir.

Mikukvøldið spældi landsliðið sætta altjóða skrásetta landsdystin á Tórsvølli. Heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað at fáa mál. Russland vann 3–0, og tað kann beinanvegin leggjast afturat, at tað var bíliga sloppið. Føroyska liðið hevði allar 90 minuttirnar bara eina álvarsliga roynd á mótstøðumálið. Kurt Mørkøre, sum bar meiri tyngd í álopspartin, tá hann beinanvegin eftir steðgin varð skiftur inn, snaraði um brotsteigarmarkið kring seg sjálvan. Skotinum bilti einki, men russiski málverjin, sum fyri tað mesta var arbeiðsleysur, pareraði.

Russiska liðið hevði einar 10–12 púra upplagdar møguleikar. Jákup Mikkelsen vísti fýra ferðir fínar bjargingar, og so vóru russararnir hopileysir at misnýta, tá teir høvdu spælt seg inn um føroysku verjuna og lagt innfyri. Tvær ferðir í 2. hálvleiki sendu teir við síðuna av málinum, eftir at teir vóru komnir inn um Jákup Mikkelsen.

## Uppvísningurin

Tað sást beinanvegin, at russararnir vóru komnir til Føroya eftir øllum stigunum, og at teir ætlaðu at vinna tey við manér. Teir høvdu stutt sagt uppskriftina uppá, hvussu føroyska liðið skal takast á heimavølli.

Karpin í høgru og Alenichev í vinstru høvdu fyri tað mesta annað beinið á síðulinjuni. Spælið varð togað so langt í borðini, sum tað bar til. Tað ráddi um at gera renniøkið hjá føroysku spælarunum stórt og vítt. Á miðvøllinum arbeiddu bólttryggu russararnir nógv og skilagott. Teir spældu eitt tvey samanspæl, teir yvirlappaðu í síðunum, teir høvdu nógvar bóltyvirtøkur, teir evnaðu allir og altíð at snara ein og fleiri mótstøðumenn av sær, teir brúktu diagonalsendingar, og teir dugdu at stinga skilagóðar bóltar fram ímillum.

Serliga í 1. hálvleiki var tað ein fragd at síggja, hvussu gestirnir megnaðu at lata bóltin ferðast í væl kendum mynstrum og at staðfesta, at hóast leikferðin í løtum var sera høg, so megnaðu teir at varðveita konsentratiónina, at fanga støðurnar og við stórum fótbóltsskili at velja eina av fleiri uppløgdum loysnum. Talan var stutt sagt um avrik, sum – serliga í 1. hálvleiki – mundi teljast ímillum tey bestu, sum tað ber til at síggja. Neyvan hevur nakað lið áður víst sovorðið fótbóltsspæl í Føroyum, sum russararnir gjørdu í 1. hálvleiki. Allur keðiligur og hugflogs fátækur russiskur systematikkur, sum tað plagar at vera so nógv at hoyra um, var fullkomuliga burtur.

Russararnir spældu seg til eina rúgvu av møguleikum, sum teir kundu havt skorað uppá, men teir vóru ikki altíð so neyvir, og Jákup Mikkelsen bjargaði onkra ferðina. Tá hálvur tími var farin, høvdu teir skorað tvey mál, og hóast tað onkuntíð hevur eydnast at koma afturíaftur úr sovornari støðu, so var kenslan hesa ferð, at spurningurin heldur var, hvussu stórt tapið fór at verða.

Vladimir Beschastnykh, sum ikki kom á vøllin eftir steðgin, tí hann var smáskaddur, skoraði bæði málini, og bæði vóru tey bílig. Hitt fyrra kom, tá hornaspark úr høgru varð snittað til handara stólpan, har málskjúttin átti at havt verið drigin rangstaddur, og hitt seinna kom eftir skjótt uppspæl og flatt innlegg úr høgru til ein púra leysan álopsmann við handara stólpan.

## Illa skipað

Tá russararnir hava fingið allar rósurnar, sum avrikið hjá teimum legði upp til at geva, so eigur at verða lagt afturat, at serliga í 1. hálvleiki stóð føroyska liðið sera veikt í myndini. Tað kendist sum um teir ikki rættuliga vóru tunaðir til stóru avbjóðingina – ivaleyst hevði prísurin hjá teimum fyri leygardagssigurin á Luksemborg kostað meiri í orku og konsentratión, enn tapið hjá russunum í Slovenia hevði ávirkað.

Føroyingar høvdu onga framrættaða hóttan. Hóast Onopko ikki er av skjótastu spælarunum, so hevði hann ongar trupulleikar, tá føroyingar komu fram á vøllin. Fróði Benjaminsen royndi í 1. hálvleiki at stýra miðvallarspælinum, og í onkrari løtu eydnaðist tað so dánt, men sum heild snúði tað seg hjá føroyingum mest um at verja.

Aftastu menninir høvdu sera ilt við at ansa tætt. Ofta tóktust teir sum flugur í fløsku, tí mótstøðumenninir runnu so nógv, og tað var uppaftur truplari, tá russararnir megnaðu at spæla seg ígjøgnum í borðunum.

Eftir steðgin stóðu føroyingarnir seg betri. Leikferðin hjá russarunum var eitt vet lægri, tí hekk samanspælið hjá føroyingunum betri saman, og persónligu markeringarnar riggaðu betri, enn økisansingarnar høvdu gjørt tað undan steðginum.

Liðið varð umskipað, Jákup á Borg var fluttur inn á sentrala miðvøllin, har hann skuldi taka sær av Izmailov, Julian var meiri við, og aftaru menninir fingu betri tak á tí.

Kurt Mørkøre fekk ikki mál upp á sína roynd. Hóast áskoðararnir so smátt fóru at ressast, tá tað restaði eitt korter, so livdi vónin. Um hesa tíðina í fjør eydnaðist síðstu lítlu løtuna at skora tvær ferðir og harvið at javna ímóti Slovenia. Men hesa ferð vóru tað gestirnir, sum skoraðu, tá innskifti Shirko eftir uppspæl í høgru varð spældur púra blankur.

## Tanáringur yvir øllum

Ímóti stórum tjóðum verður altíð vónað, at tað skal bera til hjá Føroyum at fáa eitt gott úrslit. Hesa ferð brast vónin. Føroyingar skoraðu ikki, og nú verður fyrsta landsliðsmálið á Tórsvølli at bíða í hvussu so er inntil komandi ár.

Føroyingarnir vóru ikki so vónbrotnir. Teir høvdu tapt 3–0 ímóti einum liði, sum er á veg í HM endaspælið, har teir hava møguleika at gera meiri um seg, enn russarar áður hava gjørt. Yvir øllum hinum góðu spælarunum skein bara 18 ára gamli Marat Izmailov úr Spartak Moskva. Hetta var bara triði landsdysturin hjá honum, men tað verður heilt víst nógv meiri at hoyra til hansara, og tað skal ikki undra, um hann skjótt verður seldur til eitt av stóru vestureuropeisku feløgunum.



*Julian liggur*
*Serliga í 1. hálvleiki var tað ein fragd at síggja, hvussu gestirnir megnaðu at lata bóltin ferðast í væl kendum mynstrum og at staðfesta, at hóast leikferðin í løtum var sera høg, so megnaðu teir at varðveita konsentratiónina*





*Hóast teir ikki vóru av skjótastu monnum, so høvdu russisku verjuleikararnir ikki stórvegis trupulleikar av at temja fáa føroysku álopsroyndirnar*

### Dysturin í tølum:
**Føroyar–Russland 1–0 (0–0)**

**HM UNDANKAPPPING**
Mikudagin 5. september 2001, kl. 17.30 á Tórsvølli
2.927 áskoðarar
Dómarakvartett úr Írlandi: Hubert BYRNE, Eddie FOLEY, Joseph O'BRIEN og Poul McKEON
FIFA umboðsmaður úr Grikkalandi: Theodorosus THEODORIDIS
FIFA dómaraeygleiðari úr Svøríki: Bo KARLSSON

0–1: Vladimir BESCHASTNYKH 19.
0–2: Vladimir BESCHASTNYKH 30.
0–3: Alexander SHIRKO 88.

**Føroyar:** 1. Jákup MIKKELSEN 24/-44, Molde BK – 4. Johan B. HANSEN, 7/0, OB, 5. Hans Fróði HANSEN, 22/1, B68, 2. Óli JOHANNESEN, 54/1, liðformaður, Hvidovre IF, 3. Jens Kristian HANSEN, 40/3, B36 – 9. Jákup Á BORG, 16/0, B36 (18. Súni OLSEN, 5/0, Zwolle FC, 81.), 7. Fróði BENJAMINSEN, 14/0, B68, 8. Julian JOHNSSON, 43/1, Hull City FC, 6. Øssur HANSEN, 48/2, B93– 10. John PETERSEN, 36/3, B36, 11. Christian Høgni JACOBSEN, 8/1, Esbjerg BK (13. Kurt MØRKØRE, 36/3, KÍ, 46.)

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Allan MØRKØRE, 54/1, HB, 14. Jóhannis JOENSEN, 9/0, HB, 15. Rógvi JACOBSEN, 11/0, HB, 16. Jens Martin KNUDSEN, 52/-139, NSÍ, 17. Heðin Á LAKJUNI, 5/0, B36

**Gult kort:** Fróði Benjaminsen 35., Julian Johnsson, 56.
**Reytt kort:** Eingin

**Venjari:** Allan SIMONSEN 51
**Hjálparvenjari:** Jógvan Marin OLSEN
**Liðleiðari:** Birgir HANSEN
**Lækni:** Jens Pauli MARSTEIN
**Fysioterapeutar:** Álvur HANSEN og Klæmint ISAKSEN

**Russland:** 1. Rusian NIGMATULLIN, 13/-8, Lokomotiva Moskva – 2. Yuri DROZDOV, 9/0, Lokomotiv Moskva, 3. Yuri NIKIFOROV, 51/6, PSV Eindhoven, 7. Victor ONOPKO, 74/6, liðformaður, Real Oviedo, 6. Yuri KOVTUN, 39/3, Spartak Moskva – 8. Valery KARPIN, 63/17, Celta Vigo, 9. Egor TITOV, 25/4, Spartak Moskva, 4. Sergey SEMAK, 28/1 CSCA Moskva (17. Dmitry KHOKHLOV, 33/3, Real Sociedad, 53.), 5. Dmitry ALENICHEV, 38/5, FC Porto (16. Andrey KORIAKA, 2/0, Krylja Sovetov Samara, 83.) – 10. Marat IZMAILOV, 3/0, Zenith St. Petersburg, 11. Vladimir BESCHASTNYKH, 58/20, Spartak Moskva (18. Alexander SHIRKO, 6/1, Torpedo Moskva, 46.)

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Alexander FILIMONOV, 14/-10 Dinamo Kiev, 13. Viacheslav DAEV, 1/0, Torpedo Moskva, 14. Igor CHUGAINOV, 22/0, Lokomotiv Moskva, 15. Rolan GUSEV, 8/0, Dinamo Moskva

**Gult kort:** Valery KARPIN 49.
**Reytt kort:** eingin

**Venjari:** Oleg ROMANZEV
**Hjálparvenjari:** Mikhail GERSHKOVICH